# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Helgi Skorá, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya

Hósdagin 11. august hevði Helgi Skora í Havn 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya.

Helgi er ættaður úr Kaldbak. Sum ungur var hann sjómaður og arbeisðmaður, eisini róði hann út í Grønlandi nøkur ár.

Frá 1968-79 koyrdi hann hýruvogn á bilstøðini Auto, og síðan 1980 hevur hann arbeitt sum bilførari hjá Postverki Føroya. Arbeiðið umfatar mest postkoyring í Havnini, men eisini til Klaksvíkar, Sandoy og aðrar staðir í landinum.

Helgi hevur stóran áhuga fyri náttúruni og kríatúrum. Saman við soninum hevur hann eina trøð í Havnardali, har teir nýta ta mesta av frítíð síni, teir hava gæs, dunnur, og seyð og velta



epli og røtur. Eisini gongur Helgi á fjall í Kollafirði.

Hann er giftur Mallu, f. Winther, úr Skopun, og tey eiga trý børn: Nina, Rósing og Joan, sum øll búgva í Havn. Abbabørnini eru 9 í tali og eitt langabbabarn.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gunnhild Johansen** í Klaksvík andaðist á Klaksvíkar røktarheimi týsdagin, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Kelda: Útvarpið*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Gunhild Johansen**

andaðist á Norðoya Røktarheimi týsdagin 9. august, 85 ára gomul.

Jarðarferðin verður týsdagin 16. august kl. 13.30 úr Christianskirkjuni.

*Familjunnar vegna,*
**Guðrun og Ovi**

Havnar leksikon:

## Havnarskrivstovan á Eystaru bryggju

Húsini hjá havnarmyndugleikunum á eystaru bryggju (uttast til høgru á myndini) vóru boðin út í 1931, og stóðu liðug í 1932. Við síðuna av Havnarskrivstovuni var í mong ár ein vekt at viga bilar á.

Myndin er tikin nakað eftir, at Havnarskrivstovan var liðug. Eisini síggjast húsini á Skansanum, bygningurin hjá Balslev & Goos og uttast t.v. Vandbygningsvæsenet (VBV). Ein suðuroyarslupp liggur við molan, og ein lastbilur frá 30-unum er eisini við á myndini.

Havnaskrivstovan varð tikin niður í 1969, og ein nýggjur bygningur í tveimum hæddum varð bygdur á sama stað. Hesin bleiv seinni tikin niður aftur.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 ella 214647.



*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn*